einfaldari

- ger tað einfaldari

Januar 2010

# Lívdin í Skúlan við Løgmannabreyt



Mynd: Pauli Djurholm

Eftir ætlan flytur Lívdin úr Hoyvíkar Skúla niðan í Skúlan við Løgmannabreyt tann 1. februar 2010.

Harrin letur ongar dyr aftur, uttan at Hann eisini letur upp aðrar dyr. Og nú hevur Harrin latið upp dyr, tí vit hava fingið møguleikan at leiga okkum inn í nýggja skúlan við Løgmannabreyt.

Við hesum letur upp seg fyri okkum ein verð við nýggjum møguleikum í framúrskarandi góðum, stórum og luftigum hølum, har samkoman kann húsast framyvir. Har eru sera góðar umstøður fyri okkum øll - og serliga fara umstøðurnar at vera góðar fyri børnini, ungdómin og familjurnar.

Vit eru Harranum ómetaliga takksamir fyri, at Hann leiðir okkum, og at vit síggja tað so týðiliga og klárt. Vit fara at heita á samkomuna um at halda á í bønunum og at vera við gott mót, tí vit kenna av sonnum náði Harrans yvir okkum. Vit síggja eisini tíðina í Skúlanum við Løgmannabreyt sum eina roynd, har vit skulu vaksa okkum inn í nýggja bygningin hjá Lívdini. Vit fara tí at halda á at savna pening til byggingina, og vit biðja eftir, at Harrin skal leggja nógv fólk afturat samkomuni komandi árini. Mátti tað áhaldandi verið sagt um okkum, sum varð sagt um samkomuna í Jerúsalem: "Tey lovaðu Gudi og vóru nógv umhildin av øllum fólkinum. Og Harrin legði dagliga afturat teimum nøkur, sum lótu seg frelsa." (Áp. 2:47).

*JZ*

lívdin
– í livd hins hægsta

Tíðindi Kunning Lýsingar Skráir

## Veldigur Gud

Vit hava um jólini kent friðin, sum "Friðarhøvdingin" gevur, og nú hyggja vit við dirvi inn í nýggja árið í áliti á, at hann sum eitur "Veldigur Gud", eisini er vón okkara. Í sálmi 103:19 sigur Dávid: "HARRIN hevur reist hásæti Sítt í Himli, og alt er lagt undir ríki Hansara."

Harrin er Kongur, og hásæti Hansara er í himli og Hansara myndugleiki fevnir um alheimin allan. Sálmaskaldið - Dávid kongur - heldur fram og fer nú upp á kórleiðarapallin og skipar alt skapanarverkið í einum lovsongi. Hann heitir á allar verur í samfeltum ljóði: "Lovið HARRANUM, tit einglar Hansara, tit veldigu í mátti, sum gera tað, ið Hann býður, við tað sama sum tit hoyra ljóðið av orði Hansara!" Somu áheitan - um at lovsyngja - gevur hann herskarum og tænarum Hansara. Hann heitir eisini á "øll verk Hansara" um at prísa Harranum.

Undrast tú um skapanarverkið? Hevur tú nakrantíð lagt teg á vøllin eitt stjørnuklárt heystkvøld og bert hugt út í rúmdina? Kenslan er so ovurstór, at tað skjótt ørar fyri tær, tí so stór er henda veldiga sjón. Esaias 40:26 sigur: "Lyftið eygum tykkara móti hæddini og hyggið! - Hvør hevur skapt alt hetta? Tað er Hann, ið førir her teirra út í ásettum tali og rópar tey øll við navni; so stór eru kraft og veldi Hansara, at ikki eitt saknast!" Her verður talað um skapanarverkið, og tá ið sagt verður: "Tað er Hann, ið førir her teirra út" verður meint við himmallikamini, og hvussu Hann skipar og samskipar alheimin, og enntá rópar tey øll við navni. Gud, sum heldur øllum í sínari hond – Harrin Gud Herskaranna - Hann skal eisini halda tær uppi!


Ólavur Jøkladal

Dávid endar sálmin við at siga: "Sál mín, lova HARRANUM!" Lat tað vera okkara mál í nýggja árinum - 2010.

- GOTT NÝGGJÁR!

# Lívdin

## Lívdin í 10 ár

Umleið 10 ár eru liðin síðan fyrireikingarnar til samkomuna Lívdina byrjaðu í 2000 við fyrireikandi fundum í ymiskum heimum og bønarløtum í húsunum hjá Kristniboðsambandinum úti á Fløtum. Sunnudagin 26. august 2001 var fyrsta almenna møti hjá samkomuni í Verkhúsinum Virkni á Berjabrekku. Síðan á heysti 2002 hava almennu møtini hjá Lívdini verið hildin í Hoyvíkar Skúla.  Frá 1. februar 2010 flytir samkoman í Skúlan við Løgmannabreyt, har fyrsta møti eftir ætlan verður sunnudagin 7. februar.


1. á Fløtum


2. Verkhúsið Virkni


3. Hoyvíkar Skúli


4. Skúlin við Løgmannabreyt (Mynd: Pauli Djurholm)

# Tiltøk

## Tiltøk á Brekku 3
(bygningurin aftan fyri MBM)



**Undirvísing, bøn og bønarskúli** **týskvøld kl. 20.00**

5. jan. Opið evni / bønarløta
12. jan. Húsbólkar
19. jan. Opið evni / bønarløta
26. jan. Hvat er og hvat ger Lívdin fyri nýggj í Lívdini

## Samkomulegan á Zarepta




Samkomulegan hjá Lívdini verður á Zarepta vikuskiftið 7.-9. mai 2010. Nærri verður lýst seinni um leguna.

## Samkomuveitslan í Oasuni



Eins og undanfarin ár verður árliga veitslan hjá Lívdini hildin í samkomuhølunum hjá Oasuni leygarkvøldið 30. januar. Talan er um eitt sera hugnaligt kvøld við nógvum undirhaldi, spølum og skemti.

## Jóla- og nýggjársmøtir

Sunnudagin 20. desember 2009 var jólamøti, og sunnudagin 27. desember var nýggjársmøti í Lívdini við m.a. talum, práti, framførslum og samrøðum við útisetar.

*Myndir: Einar Vang*







## Tá lívið gerst trupult

Agape.fo bjóðar nú skeið fram um handfaring av strongd.

Strongd er ikki ein sjúka ella tekin um veikleika. Strongd er ein fylgja av overving av onkrum slagi. Um vit ikki hava førleikar til at handfara hesa overving, so er vandi fyri, at strongdin kann føra til t.d. tunglyndi.

Skeiðið er sett saman av fýra samanhangandi pørtum, sum eru einaferð um mánaðin frá hálvum januar til hálvan apríl 2010. Endamálið við skeiðinum er at gera luttakaran betri føran fyri at handfara strongd í gerandisdegnum. Undirvísari verður Ole Rabjerg, autoriseraður psykologur. Ole er í starvi hjá felagnum Agape í Danmark, har hann arbeiðir ígjøgnum terapi, fyrilestrar og skeið, sum byggja á tað kristna lívs- og menniskjasjónarmiðið. Les meira á www.agape.fo



# Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla

### Sunnudagin 3. januar

Familjumøti kl. 10.30: *Í heita stólinum: Elsa og Kristina og útisetar.*
*Evni: Fjakkarar*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Nýggj byrjan, sami Meistari: Kristus*
*Talari: Jógvan Zachariassen*
** Innsavning til nýggja bygningin*



Jóhan

### Sunnudagin 10. januar

Familjumøti kl. 10.30: *Í heita stólinum: Guttorm, Siri og Magni*
*Evni: Børnini og UngLív*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Nýggj byrjan, somu umstøður: Náði*
*Talari: Jógvan Zachariassen*



Jógvan

### Sunnudagin 17. januar

Familjumøti kl. 10.30: *Í heita stólinum: Ólavur, Ása, Rúna, Rúni og Annika*
*Evni: Húsbólkar og vælkomubólkurin*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Nýggj byrjan, somu møguleikar: Tænasta og trúboðan.*
*Talari: Jóhan Syderbø*

### Sunnudagin 24. januar

Familjumøti kl. 10.30: *Í heita stólinum: Árant, Jórun og Anita*
*Evni: Praktiskar tænastur og hølini á Brekku*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Nýggj byrjan, somu fólk: Næsti mín*
*Talari: Øssur Berghamar*



Øssur

### Sunnudagin 31. januar

Familjumøti kl. 10.30: *Í heita stólinum: Rúni, Ilda og Dánjal*
*Evni: Ungdómurin og Glink (generationlink)*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Nýggj byrjan, nýggjar umstøður: Løgmannabreyt.*
*Talari: Jógvan Zachariassen*

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni.*

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*